Viðmerkingar

# Landgrunsmarkið

Samráðingarnar um landgrunsmarkið eru endaðar. Miðlinjan skuldi verða mark sambært altjóða havrættinum.

Av tí økinum, sum ivi var um, tí grøn leiðini, fóru bretar avstað við 85%, og føroyingar fingu bert 15%, enntá av tí økinum, sum verður mest áhugavert í oljuhøpi. Dávid vann á Goliat, segði formaðurin í uttanlandsnevndini á løgtingi. Menn kappast um at rósa hvør øðrum og avtalunni.

Hetta minnir ikki sært um, tá ið Føroyar onkuntið hava tapt 5-0 í fótbólti móti utlendskum stórlið, og flestu føroyingar tvíhildu um, at tað vóru vit, sum høvdu vunnið stórt allíkavæl.

Upprunakravið hjá bretum er almannakent, tað rakk langt norður í føroyskt øki.

Tað er bláoygt at sammeta samráðingarúrslitið við upprunaligu bretsku krøvini, tí hesi krøvini vóru órómilig og kundu ikki takast í álvara. Hetta hava bretar sjálvir viðgingið seinni. Hetta krav søgdu vit sjálvandi kortanei til.

### Hvør fekk bretar at slaka

Í sjónvarpssendingini Krosskasti røndi Anfinn Kallsberg løgmaður at sannføra hyggararnar um, at tað var hann, sum hevði fingið bretar at slaka. Sjálvur vísti eg á, at bretar høvdu slakað 95%, aðrenn Anfinn gørdist løgmaður.

Ein neyvari útrokning visir, at talan er um meir enn 95%.

Fiskiøkið er ikki broytt í stødd, tað er tað sama, sum tað hevur verið, síðan sjómarkið fór út í 1977. Men nú eru fastar reglur fyri, hvør kann fiska og hava eftirlit við økinum.

Tó hoyrir ein geiri uppá góðar 1100 km² av føroyskum landgrunni upp í hetta felags fiskiøki.

Sjálvandi er eingin avtala, fyrr enn undirskrivað er endaliga, ella, sum maðurin segði, eingin fiskiturur er veruliga endaður, fyrr enn lastin er seld.

Tí kann av røttum sigast, at hesin túrurin var langur, meira enn 20 ár tilsamans, átta av teimum undir føroyskari leiðslu við løgmanni sum skipara. Av tí, sum bretar høvdu lætt skipið við, komu 96% aftur í lastina, aðrenn Anfinn gørdist løgmaður, og bert 4%, meðan hann var løgmaður. Og tað er alt ov lítið.

### Allir flokkar sín leiklut

Tað hevði verið skeivt ikki at sagt, at hesum máli hava allir flokkar á løgtingi sín leiklut í. Okkara embætisfólk og ráðgevarar eiga eisini sín stóra leiklut.

Eg eri sannfurður um, at landsstýrið handlaði skeivt og í panikki, og at meira kundi fingist burturur, ella rættari sagt, at missurin kundi verið minni.

At teir, sum slakaðu ov tíðliga, nú aftana endurtaka upp í saman, at tað einasta alternativið til slakingina var dómstólurin í Haag, tað er tað reina tvætt.

Fyri tað fyrsta hava teir sagt tað so mangar ferðir fyrr. Fyri tað annað var slettis eingin vandi fyri hesum longur. Semastu tíðina eru tað bretar, sum hava havt nogv størri skund at fáa málið avgreitt enn vit føroyingar.

Eg eri eisini sannfurður um, at søgumenn í hesum máli fara at geva Sambandsflokkinum rætt.

**Edmund Joensen**
formaður
Sambandsfloksins

### Virðið tjóðfuglin

– eisini eftir grækarismessu

# Fíggjarmálastýrið má virða gjørdar avtalur

Sattmálasamráðingarnar fyri hesa ferð eru um at vera avgreiddar. Eitt av fáu felaganum, sum eru ikki hava skrivað undir, er Yrkisfelagið hjá Studentaskúla- og HF lærarum (YF), og nú kann tað enda við, at lærararnir fara í verkfall komandi friggadag – tann dagin tá munnligu prøvtøkurnar hjá 2. hf eru settar at byrja.

Tað er væl skiljandi, at næmingar, foreldur og onnur órógvast og undrast, hvi hetta skal vera so. Vit undrast eisini um, at tað ikki skal lata seg gera at finna eina semju, og vit halda, at arbeiðsgevarin er sera stívrendur við ikki at vilja virða tað, sum semja áður er gjørd um.

Ósemjan snýr seg í høvuðsheitum um tveir lutir.

Annar er lønarkravið. Tann spurningin fara vit ikki at gera viðmerkingar til her, og vit roknu við og hava tað alit á þortunum í trætuni og semingsmonnunum, at tað, sum í øllum øðrum fórum fer at bera til at finna eina semju um hetta.

Hin spurningurin er hámarkstalið á næmingum í flokkunum (24). Hetta er eitt prinsippielt mál, sum YF og landsstýrið í fjør gjørdu semju um. Fíggjarmaraðharrin, sum er arbeiðsgevari hjá YF, var ikki komin í hetta sessin tá, og vit høva okkum tí hørvið at lýsa fyri honum seguliga høpið undir semjuni í fjør, og harvið hvi vit halda, at hetta hámarkstalið als ikki er ein samráðingarspurningur, hvørki hesa ferð ella í framtíðini.

Í 1991 gjørdi landsskulafyrisitingin, LSF, av, at 28 næmingar skuldu vera í tveimum 1. flokkum í Studentaskulanum í Eysturoy. Lærararnir motmæltu og vístu á siðvenuna, at tað ongantíð hevdu verið fleiri enn 24 næmingar í einum flokki. LSF kveistraði hetta av borðinum og segði, at siðvenjur kundu broytast, og lærararnir skuldu seg til tols við hesum.

Í 1992 var landskassin tómur. Landsstýrið vildi spara – eisini á okkara øki – og YF og LSF samráddust um, hvussu hetta kundi lata seg gera. Úrslitið var, at lærararnir hildu fri í eina viku uttan løn á heysti í 1992. Í hesum sambandi eydnaðist YF formliga at fáa sligið fast, at óskilið við storu flokkunum frá 1991 ikki skuldi endurtaka seg.

Semjan um frivikuna og sparingina gekk út uppá, at fyri vikuna, sum YF lógvi vit høva okkum tí hørvið at lýsa fyri honum seguliga høpið undir semjuni í fjør, og harvið hvi vit halda, at hetta hámarkstalið als ikki er ein samráðingarspurningur, hvørki hesa ferð ella í framtíðini.

Í 1991 gjørdi landsskulafyrisitingin, LSF, av, at 28 næmingar skuldu vera í tveimum 1. flokkum í Studentaskulanum í Eysturoy. Lærararnir motmæltu og vístu á siðvenuna, at tað ongantíð hevdu verið fleiri enn 24 næmingar í einum flokki. LSF kveistraði hetta av borðinum og segði, at siðvenjur kundu broytast, og lærararnir skuldu seg til tols við hesum.

Í 1992 var landskassin tómur. Landsstýrið vildi spara – eisini á okkara øki – og YF og LSF samráddust um, hvussu hetta kundi lata seg gera. Úrslitið var, at lærararnir hildu fri í eina viku uttan løn á heysti í 1992. Í hesum sambandi eydnaðist YF formliga at fáa sligið fast, at óskilið við storu flokkunum frá 1991 ikki skuldi endurtaka seg.

Semjan um frivikuna og sparingina gekk út uppá, at fyri vikuna, sum YF lógvi vit høva okkum tí hørvið at lýsa fyri honum seguliga høpið undir semjuni í fjør, og harvið hvi vit halda, at hetta hámarkstalið als ikki er ein samráðingarspurningur, hvørki hesa ferð ella í framtíðini.

Landsstýrið fekk sína sparing beinanvegin, men ágoðin, sum YF hevur fingið av semjuni, hevur verið meira ivasamur. Punkt 3 gørdi LSF ongantíð nakað við, punkt 2 mundi tað vera so sum so við, og í januar 1998 mátti YF vera í verkfalli millum trúggar og fýra vikur, tí myndugleikarnir ætlaðu at taka aftur tað eina, sum teir góvu í 1992.

Verkfallið í januar 1998 endaði við einari semju millum Fíggjarmálastýrið og YF, har tað enn eina ferð varð staðfest, at vanliga eigur næmingatalið í einum studentaskúla- og HF flokki ikki at fara upp um 24, og *at sattmalin skuldi verða dagførdur sambært hesum.*

Nú vil YF hava hetta í sáttmálan. Tað vil landsstýrið ikki. Samráðingarleiðarin hjá teimum sigur, at ta ein sáttmali er uppsagdur, so er einki galdandi, og tað skal so at siga byrjast frá botninum.

Tað er rætt, at vit hava onga høvuðsavtalu, og tað er rætt, at í prinsippinum er eingin sáttmali galdandi, men siðvenjan er, og tað hava vit sæð hesar síðstu vikurnar, nú nýggir sáttmálar eru undirskrivaðir, at í samráðingum verður stuðið tikið í tí, um hevur verið galdandi, og tá YF hevur goldið so nógv bæði í 1992 og í 1998 fyri at fáa 24 talið upp á pláss, so eiga øll at skilja – og tað álit hava vit á landsstýrismanninum, at hann eisini ger – at hetta kann ikki vera ein samráðingarspurningur hesa ferð.

Tí eru okkara ráð, at sattmalin verður dagførdur sambært avtalunni frá 28. januar 1998, soleiðis at næmingarnir kunnu fara til prøvtøku eftir kunngjørdu ætlanini, og soleiðis at næmingar, lærarar og onnur ávarðandi fáa trygd fyri, at hetta sirkusið ikki fer at endurtaka seg ár eftir ár.

Kambsdalur
hin 14. mai 1999
**Joannes Hansen**
**Kári Nolsøe Olsen**
limir í YF



AVRIT

Semja millum
Fíggjarmálastýrið
og
Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara
um næmingatal í flokkum

1. Roknað frá 1. august 1998 fer avtalan frá 25. september 1992 er gildi, og ístaðin verður hetta galdandi:
Næmingatalið í einum studentaskúla- og HF-flokki eigur vanliga ikki at fara upp um 24. Í undantaksføri kann tó verða farið upp um 24 næmingar. Afrenn næmingaleiðarin tekur avgerð um hetta, skal málið verða sent Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara til umsagnar.

2. Flokkarnir 1. x og 1. y á Kambsdali halda hetta skiplagið fram sum 1. x og 1. y.

3. Øll viðmerkingarnar í sattmálanum verða fjarlagaðar í meting. Vit verður til hjálagda fyrigerð.

4. Sáttmálin verður dagførdur sambært sáttmálavtalunni.

Tórshavn, 28. januar 1998

Fíggjarmálastýrið, lærararleiðin

Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara

# Rætturin til at velja skúla til børn síni

Eri varamaður Fólkaflokksins í Suðurstreymoy og havi í hesum sambandi verið inni fyri Óla Breckmann triggar ferðir hesa tingsetuna 18. mars setti eg landsstýrismanninum í skúla- og mentamálum, Signar á Brunni, ein fyrispurning viðvíkjandi føroyskari friskúlalog. Spurningarnir vóru hesir:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera uppskot til eina føroyska log um friskúlar at leggja fyri Løgtingið?
2. Nær verður hon lagd fyri Tingið?

Fari at viðgera svarið, sum eg fekk, og fari samstundis at gera viðmerkingar til málið.

Í hesum dømum verður nógv tosað um frælsi. Búskaparligt frælsi – at duga at standa á egnum beinum. At taka ábyrgd av egnum avgerðum.

Í Føroyum hava vit onga friskúlalog – øll londini kring okkum, sum vit vanliga meta okkum við, hava friskúlalogir. Men í Føroyum kunnu foreldur ikki velja millum ymisk skúlatilboð – og hetta er ikki, tí at spurningurin ikki hevur verið frammi fyrr. Tí ma eg spyrja: Hava vit ikki andligt frælsi í Føroyum? - og hvussu kunnu vit tosa um buskaparligt frælsi, tá ið hægri myndugleikar ikki tora at lata nøkra ábyrgd til foreldrini, ið hóast alt eiga børnum?

Sambært heimsyvirlýsing ST §26 stk 3 stendur: *»Foreldur hava í rætt til at velja, hvat slag av undirvising skal verða givin børnum teirra.«*

– Vit mugu sostatt hava møguleikar fyri at velja millum ymisk skúlatilboð.

– Vit mugu lita á, at foreldur eru fór fyri at taka ávgerðir um, hvønn skula tey ynskja at koyra sínt børn.

– Vit mugu lita á, at lærarar eru fórir fyri at taka ábyrgd av sínum undirvising.

– Vit mugu hava eina friskúlalog, ið trygglar, at friskúlar hava greiðar reglur at halda seg til.

Í samgonguskjalinum stendur greitt, at »møguleiki skal vera fyri frí- og eftirskúlum«. Tað er gott, at arbeitt verður við at fáa eftirskúlar í Føroyum. Nógv ung fara heldst at nýta henda nýggja møguleika. Eisini er tað gleðiligt, at hugsað verður um at geva teimum menningartarnaðu tilboð í Føroyum.

Men at friskúlalogin verður av ongum, kann ikki góðtakast. Samgongan hevur bundið seg til at arbeiða við tí, sum hon hevur sett sær fyri í samgonguskjalinum.

Møguleikin fyri at seta friskúlar á stovn er tengdur at figgarligari orku, og aftur her kemur friskúlalogin inn. Í Danmark rindar landið upp í 85% av rakstrinum. Foreldur gjalda sín part – og tað gera tey. hóast tey gjøgnum skattin eisini rinda fyri fólkaskúlan.

Í svarinum uppá fyrispurningin stendur: *»Um ætlanin við eini løgtingslog er at geva* ***betri møguleikar*** *at seta friskúlar á stovn, kann tað fara at koma okkum aftur um brekku í ólukkumata.«*

Gjørdist klokk, tá ið eg las hetta, tí at landsstýrismaðurin orðar seg soleiðis, – to uttan at koma við haldgóðum grundgevingum.

Vist verður á, at undirvisingarmøguleikarnir á einum littlum skula verða skerdir. Her veldst sjálvsagt um, hvussu smaar skúlar, hugsað verður um, men nógvir fyrimunir eru, tá ið skúlar ikki eru ov stórir. Hetta munnu flestallir lærarar vera samdir um. Vit kunnu so eisini spyrja: Hví hava vit 47 heilt smaar skúlar kring landið, tá ið undirvisingarmøguleikarnir verða so nógv skerdir?

Vit mugu slaa fast, at møguleiki er ikki fyri at seta friskúlar á stovn í dag, tí vit hava onga log á okinum. Tí ber ikki til at tosa um at gera møguleikarnar betri.

Kortini hava vit ein friskúla í Føroyum. Adventistaskúlin í Havn er friskúli, og har ganga 103 næmingar. Plasstrot er, tí landið rindar einans 85% av lærararønunum, so torfört er at bygga út. Samkoman rindar árliga undirskotið, og tískil hava vit ein friskúla í Føroyum. Var plass fyri øllum, sum ynskta at ganga har, vóru umleið 180 næmingar. So tørvurin er heilt greitt til staðar – og talan er ikki um ein heilt litlan skúla við skerdum møguleikum.

Vit skulu ikki vænta, at ein friskúli kemur í hvørja bygd í Føroyum. Í 1988 næmingar í friskúlum eru bilgari enn fólkaskúlanæmingarnir. Talan er um rættiligu stóran mun.

Fari ikki at koma nærri at figgarligum og námsfroðiligum spurningum, tí at hava eina friskúlalog er ein spurningur um rættindi. At tey, sum ynskja ein annan skúla enn fólkaskúlan, skulu hava møguleika at stovna og reka ein friskúla.

Eftir drugva orðaskiftið 23. april spurði Signar á Brunni Fólkaflokkin, hvørja støðu løgtingsfimmrur høvdu til eina friskúlalog. Fólkaflokkurin mælti honum til at nýta donsku friskúlalogina sum grundarlag. Landsstýrismaðurin segði, at hann vildi gera eina føroyska friskúlalog. Hetta merkir, at gongd er komin á málið. Nógv, bæði foreldur og lærarar, biða eftir føroyska friskúlalogini. Tað hevði kanska verið hóskandi at lagt friskúlalogina fram saman við eftirskúlalogini, ið verður hildug um ársskiftið. So hevði samgongan longu avgreitt tvey týdningarmikil mál í stevnuskranni.

**Katrin D. Johansen**

# Hvør er gullhønan, og hvør er neyðareggið í tórsvallarmálinum?

**Inntøkurnar hjá Tórsvøll, fara tær at koma frá fótbóltinum ella frælsa ítróttinum? Áskoðari, ið hevur gingið regluliga til fótbolt í fimm londum, spyr bara.**

Fyrst vil eg takka navnabróður Ziska fyri viðmerkingina. Nú hava vit báðir so sett í gongd eitt forHeraðorðaskifti, og ætli mær ikki at vera minni forHeraður. Tað var skeivt at draga læraraskulavøllin fram, ber yvir við mær í hesum. Men sært tu! Eg havi, sum flestu landsmenn minir, als einki skil fyri frælsum ítrótti, helst stavar tað frá manglandi áhuga. Tó, lika lítið sum eg havi skil fyri frælsum ítrótti, hevur Heri Ziska skil fyri fótbóltsáskoðaraumstøðum, fótbóltsstemningi og hvat tað er, sum figgar ein leikvøll.

### Inntøkurnar hjá Tórsvøll

Fyrsti spurningur, vit eiga at seta okkum sjálvum, er: Hvørjar vera inntøkurnar hjá Tórsvøll, hvat skal figgja hann? Tórsvøllur fer at fáa burtur av atgongumerkjum, ið verða seld til Europa-Cup dystir og landsdystir, lysingarinntøkur og sjónvarpsrættindi í sambandi við somu dystir.

Tí spyrji eg teg, Heri Ziska: Hvussu nógvar inntøkur fer frælsi ítróttarin at útvega Tórsvøll? Hvussu nógvar áskoðarar hava tit havt til FM á Svangaskarði? Hvussu nógv hava tit fingið inn í atgongumerkjum? Hvussu nógv eigur deildin fyri frælsan ítrótt á bók? Ella tit hava kanska valt eina null-loysn?

### Bert hálvan sannleikan um Wembley

Sum sagt, Heri, øll tey 92 ligalíðini í Onglandi hava onga rennibreyt rundan um vallirnar, men hvat so við Wembley? Ju, her hevur Heri bara sagt hálvan sannleikan. Wembley skal hava eina mobila/transportabla, skipan har áskoðaraplass skulu koyrast *út yvir* rennibreytina í sambandi við allar teir rugbyunion, rugby-league og fótboltsdystirnar ið verða á Wembley. Hetta fyri at varðveita *fótboltsrómin/rugbyrómin, t.e. »stemningin«*, sum Heri Ziska hevur so lítlar royndir við. Men møguliga »gloymdi« Heri Ziska at nevna hesa mobila/transportablu áskoðaraskipan?

Annars verða tað Wembley og 15 aðrir vøllir (við ongari rennibreyti), ið skulu hýsa HM ár 2006. Hevði Heri havt áhuga fyri fótbólti, so hevði hann vitað, at ikki allir 64 dystirnir skulu leikast á Wembley!

Bretar eru nú millum fremstu tjóðir í Europu innan frælsan ítrótt. Hetta hava bretar meginað við at halda fótbóltin og frælsa ítróttin leysan hvønn frá øðrum. Og tá Manchester skal hýsa Commonwealth Games, t.e. leikirnir fyri bretska samveldið, ár 2002, gera teir ein separatan leikvøll til bara frælsan ítrótt. Bretar hava skilt, at fótbólturin og frælsi ítróttarin trivast best hvør sær, stik den Heri Ziska!

### Flyta frá leikvøllum við rennibreytum

Tú kunnan fyri Hera Ziska og tey, ið als ongan áhuga hava fyri fótbólti, kann eg nevna, at »trendurin« í Evropu er, at fótboltsfeløgini flyta frá leikvøllum við rennibreyt til leikvøllir við ongari rennibreyt. Molde í Noregi (fóðbyurin hjá Bondevik) hevur fingið nýggjan vøll við ongari rennibreyt. Ajax Amsterdam er flutt frá olympiska leikvøllinum í Amsterdam (1928) til Amsterdam Arena, ið onga rennibreyt hevur. AB í Danmark flytur í næstum til leikvøll við ongari rennibreyt. Bayern München flytur frá olympiska leikvøllinum (1972) í München til egnan leikvøll við ongari rennibreyt, o.s.fr. o.s.fr. Møguliga hevur Heri Ziska eitt boð uppá, hvi tey flyta frá einum vøllí við rennibreyt?

### Áskoðararoyndir úr fimm londum

Undirritaði hevur verið busettur í 6 londum: Onglandi, Danmørk, Noreg, Svoriki, Grønlandi og Føroyum. Eg havi gingið regluliga til fótbolt, har eg havi verið staddur. Varið 1990 var eg til hvønn heimadyst hjá AFC Bournemouth í ensku 2. deild, vøllurin tók 11.300 áskoðarar, har var ongin rennibreyt og ein tættur og intimur stemningur, hæddarpunktið var tó dysturin á Old Trafford í Manchester, tú veitst, Heri Ziska – har frælsi ítróttarin trivist best einsamallur.

Í Danmørk havi eg verið til dyst í Lyngby, Hadersley og Esbjerg við rennibreyt og í Parkini við ongari rennibreyt. Í Lyngby, Hadersley og Esbjerg var stemningurin á lágpunktinum, í Parkini var hann í hæddini. Í Gøteborg á »gamla och nya Ullevi«, har stemningurin var mangan betri á tí gamla leikvøllinum. Í Kristianssand í Noregi var ein rennibreyt og eingin stemningur. Vit vóru 6.000 áskoðarar til »slaget om Sør-Norge« millum Viking Stavanger og Kristianssand, null stemningur.

### Á Toftum eisini

Og so havi eg eisini mangan verið við rennibreytina á Toftum (ttil fótboltsdyst), har Heri Ziska hevur roynt seg framman fyri einum økendum tali av áskoðarum. Minar áskoðararoyndir úr fimm londum siga mær, at fyri tann, sum *skal figgja* Tórsvøll við at møta upp til Europa-Cup og landsdystir, er tað betri, at eingin rennibreyt er. Hesar royndirnar hevur Heri Ziska ikki, men spurningurin er, um Heri og tey, ið kappast við fótbóltin um ungu ídkararnar, yvirhøvur hava áhuga fyri, at landslíðið skal fáa optimala uppbakking Tað, sum Heri ikki sansar, er, at leggur B68 tak yvir áskoðaraplássini við Tofta leikvøll og í heila tíkið forbetrar umstøðurnar hjá fótboltsáskoðaranum (inntøkan!), og vit eisini gera rennibreyt fram við Tórsvøll, ja so fara fleiri fótbóltsáskoðarar at velja Toftir fram um Tórsvøll, og so ruku tær inntøkurnar. Um frælsar ítróttur klárar at útvega tær ístaðin, lovvi eg mær at ivast í! Og fáur man ivast, hvør er gullhønan, og hvør er neyðareggið í hesum málinum.

### Fyrimunir og vansar

Men hvørjir eru so fyrimunirnir og vansarnir við rennibreyt? Hvør fær fyrimun:

1) Frælsa ítróttarfólkið.
2) Ítróttarlærarar við næmingum.
3) okkara mótstaðuhlið í fótbólti, ið fáa tað lættari á útivølli, tí tað verður ikki tann »heksaketil«, ið var tilætlaður.
4) B68 ið kann kappast við ein grasvøll við ongari rennibreyt.

Hvør fær vansarnar:

1) Verkætlanin verður 10 milliónir dyrari.
2) Minni fótboltsáskoðarainntøkur.
3) Europa-cup liðini og landsliðið fáa ikki tá optimalu uppbakkingina.
4) HB-hús, B36-hús, svimjihøllin og ítróttarhøllin á Hálsi kunnu taka skaða av stóru spreingingini.
5) Nakrir og seinni kanska allir landsdystir enda inni á Toftum eisini
6) Grasið er viðkvæmt í Føroyum og fer neyvan at tola tann aktivitetin, Heri Ziska sipar til
7) Tá hann kevir av við mjørka, sæst so slett einki við rennibreyt.

Nei, Heri Ziska, bretska modellið (hvør sær!) er best.

Við áskoðara-inntøkukvoðu
**Heri Simonsen**
fleirtjoða áskoðari

**P.S.** Annars fáa Heri Ziska og onnur, ið varða av málinum, hvør sitt eintak av einum temablaðið sendandi, sum umhandlar áskoðaraviðurskifti fram við leikvøllum í Danmørk, eisini í Árhus.